# HB

**Havnar Bóltfelag**
Postsmoga 1333
FO-110 Tórshavn
www.hb.fo

**STOVNAÐ**
04.10.1904

**FORMAÐUR**
Birgir Enghamar

**MEISTARAR (19)**
1955, 1960, 1963, 1964, 1965, 1971, 1973, 1974, 1975, 1978, 1981, 1982, 1988, 1990, 1998, 2002, 2003, 2004, 2006

**STEYPAVINNARAR (26)**
1955, 1957, 1959, 1962, 1963, 1964, 1968, 1970, 1971, 1972, 1973, 1975, 1976, 1978, 1979, 1980, 1981, 1982, 1984, 1987, 1988, 1989, 1992, 1995, 1998, 2004

**GREIPUVINNARAR (12)**
1955, 1963, 1964, 1971, 1973, 1975, 1978, 1981, 1982, 1988, 1998, 2004

**Í 1. DEILD (65 ár)**
1942-1943, 1945-

**Í EUROPA (12)**
Meistarakappingin 1999/00, 2003/04, 2004/05, 2005/06
Steypavinnar 1993/94, 1996/97, 1997/98
UEFA Cup 1998/99
Intertoto 1995/96, 2000/01, 2001/02, 2006/07

# Stuðulsspælarar fara at sita á beinkinum

**Takið hjá nýggja HB venjaranum verður millum nógvu væl kvalifiseraðu spælararnar at finna rætta liðið og syrgja fyri, at spælararnir vera uppsettir**

Púra óvæntað vann HB FM í 2006. Í fjør kiksaði tað orduliga, tí HB endaði á fjórða plássi. Tað kostaði Krzystof Popczynski venjarasessin, at spælararnir tóktust hava mist fokus og vóru mettir eftir óvæntaða FM heitið.

Nú er tað miðvallargeneralurin í fleiri enn tíggju ár, Rúni Nolsøe, sum hevur ábyrgdina av liðnum. Eftir uppflytingar úr næstbestu deildini við AB og B68 skal hann prógva, at hann er førur fyri at lyfta HB upp á tindin aftur.

Fyritreytirnar tykjast at vera góðar. HB hevur eina rúgvu av væl kvalifiseraðum spælarum, og tað er longu undan kappingarbyrjan greitt, at fleiri, sum høvdu verið kærkomnir styrkir á flestu Formula liðunum, mugu finna seg í at siga á beinkinum í HB og viðhvørt at spæla við næstbesta liðnum.

Í venjingardystunum hevur gingið sum eftir ánni. Av tíggju vinardystum hava teir vunnið sjey, og tríggjar ferðir hevur úrslitið verið javnleikur.

Seinastu árini hevur HB hildið seg til 4-3-3, men nýggi venjarin hevur sagt, at hann ynskir at vera fleksibul. Teir hava roynt seg við 4-4-2 og viðhvørt hava teir spælt 4-3-3, og aðrar ferðir hava teir skift undir dystunum.



*Spælara fyri spælara eigur HB helst sterkasta og breiðasta hópin í landinum. Spurningurin er, um tað í ár røkkur til at føra sigursvanda felagið upp á hægstu tindar*

At tilfarið er gott, verður eitt nú staðfest í, at teir báðir í fremstu røð eru landsliðsspælarar. Andrew av Fløtum og Christian Høgni Jacobsen tykjast vera fyrsta val. Í fjør varð Christian Høgni í nógvum ymiskum plássum, áðrenn hann fór til Runavíkar. Nú skal hann vera álopsspælari og einki annað. Hendrik Rubeksen er farin av venja fyri stuttum og kann saman við Páll M. Joensen vera boð upp á álopspláss.

Tróndur Vatnhamar og Marcin Dawid kappast um plássið millum stólparnar. Fróði Benjaminsen er keyptur til at seta propp í miðverjuna, Mortan úr Hørg er vongverji í høgru, og onnur boð upp á verjupláss eru veteranurin Hans á Lag, Rasmus Nolsøe og Poul Thomas Dam, sum í fjør beit seg fastan. Millum yngru spælararnar, sum standa klárir, eru Bárður Mittelstein, Pætur Jørgensen og Torkil Kollsker. Janus M. Joensen er fyri stuttum síðani farin at venja, og hann kann seinni gerast ein møguleiki.

Í veningardystunum hevur Ólavur í Ólavstovu víst, at hann kann gerast sentralur lyklaspælari saman við Kára Nielsen. Jákup á Borg tykist eiga plássið í høgru, og í vinstru kappast unglingaspælarin Rógvi Poulsen, sum er komin av Argjum, og Páll D. Joensen um eitt pláss. Aðrir, sum stríðast um miðvallarpláss, eru Milan Kuljic og Emil N. Leifsson.

Møguleikarnir eru nógvir fyri uppstilling og spælskipan. Nú er tað upp til Rúna Nolsøe at finna røttu blandingina og ikki minst at fáa eyðkendu HB trongdina eftir at vinna fram í teimum, sum fáa høvi at fara á vøllin.

| MÁLVERJAR | Áður spælt við |
|---|---|
| Marcin DawiD | VB/S |
| Tróndur Vatnhamar | B36 |
| Thomas Juul Thomsen | |
| **VERJULEIKARAR** | |
| Bárður Mittelstein | |
| Mortan úr Hørg | VB/S |
| Hans á Lag | |
| Rasmus Nolsøe | TB |
| Fróði Benjaminsen | B68, B36, Fram (ÍSL) |
| Torkil Kollsker | |
| Janus M. Joensen | |
| Pætur Jørgensen | |
| Poul Thomas Dam | |

| MIÐVALLARAR | Áður spælt við |
|---|---|
| Kári Nielsen | B71, Skála |
| Jákup á Borg | B36 |
| Emil N. Leifsson | |
| Milan Kuljic | VB/S |
| Rógvi Poulsen | |
| Ólavur S. í Ólavsstovu | |
| **ÁLEYPARAR** | |
| Andrew av Fløtum | Fremad Amager |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ |
| Hendrik Rubeksen | GÍ, B68 |
| Páll Mohr Joensen | NSÍ |
| **TILGONGD** | |
| Fróði Benjaminsen | |
| Janus M. Joensen | |
| Christian Høgni Jacobsen | |

| FRÁGONGD | |
|---|---|
| Vagnur Mohr Mortensen | |
| Svend F. Jacobsen | B36 |
| Tór-Ingar Akselsen | 07 Vestur |
| Johan E. R. Mouritesen | TB |
| Rókur av Fløtum Jespersen | Fremad Amager |
| Rógvi Jacobsen | IL Hødd |
| **VENJARI** | |
| Rúni Nolsøe | |
| **HJÁLPARVENJARAR** | |
| Frankie Jensen & Áki Johansen | |